



MYNDIR: ÁLVUR HARALDSEN

*Jóhanna Sigurðardóttir, forsætisráðharri Íslands, og Jenis av Rana, formaður í Miðflokkinum. Jenis av Rana vildi ikki sita til borðs við Jóhonnu orsakað av hennara kynsligu sannføring.*

lúgva fyri sær sjálvum. Kanska eru tey fleiri, enn vit halda, sum taka undir við Jenisi av Rana og veruliga hava so stóra andstygd fyri samkyndum, at tey ikki kunnu vera í rúmi saman við teimum.

Ivast vit í, um so er, so man stundin vera komin, at føroyingar innanhýsis taka dystin upp um virðini, sum føroyska samfelagið skal byggja á í framtíðini.

Í løgtinginum liggur eitt uppskot um nýggja stjórnarskipan fyri Føroyar, sum kemur til viðgerðar hósdagin 23. september kl. 11.00. Tá tosað hevur verið um hetta uppskotið, hevur mest verið tosað um fyrstu lógargreinirnar, ið snúgva seg um landið, tjóðina og samvaldisstøðu landsins. Men í stjórnarskipanini eru nógvar aðrar lógargreinir, eitt nú lógargreinir, ið skulu staðfesta, at vanlig mannarættindi skulu galda í Føroyum.

Í grein 7 í uppskotinum stendur: »Øll fólk eru javnsett uttan mun til kyn, eyðkenni og frábregði.« Síðan stendur: »Eingin munur má vera tilvildarligur, órættvísur ella mannminkandi.« Í grein 8 verður staðfest: »Øll eiga rætt til lív og trygd.« Í grein 8 stendur eisini: »Ongin kann verða revsaður ella viðfarin miskunnarleyst ella óvirðiliga.« Í grein 12 verður staðfest, at øll eiga rætt at trúgva og útinna sína trúgv, og at kristnitrúnni kunnu verða veittar serligar sømdir, tó uttan at gera seg inn á aðrar fatanir.

Spurningurin er, hvørja av hesum orðingum formaðurin í Miðflokkinum hevur skilt, um hann hevur skilt nakra.

Hann javnsetti við útsøgn síni ikki Jóhonnu Sigurðardóttir og konu hennara við onnur fólk, men gjørdi mun á teimum á mannminkandi hátt. Til ber eisini at siga, at hann viðfór tær báðar miskunnarleyst og óvirðiliga. Við síni snævuskygdu kristnifatan, sum hann sambært stjórnarskipanaruppskotinum hevur rætt til at hava, tó uttan at gera seg inn á aðrar fatanir, gjørdi hann seg inn á grundleggjandi mannarættindi. Somu mannarættindini, sum vesturheimurin í heimskríggjum og borgarakríggjum hevur bløtt milliónir av litrum fyri at sleppa at orða og samtykkja í altjóða sáttmálum.

> **» Eingin munur má vera tilvildarligur, órættvísur ella mannminkandi. Eingin kann verða revsaður ella viðfarin miskunnarleyst ella óvirðiliga**
>
> *Stjórnarskipan Føroya*

## Um meirilutin talar

Hetta í sjálvum sær var nóg álvarsligt, og tí gjørdist málið eisini eitt rokmál uttanlands. Men tað hevði eisini eina aðra álvarsliga dimensión. Við síni atferð mótvegis íslendska forsætisráðharranum tók Jenis av Rana eina heila tjóð sum gíðsla, sína egnu tjóð. Hann gjørdi júst tað sama sum prædikumaðurin, ið fordømdi Elton John í summar. Setti egið trongskygni, ótolsemi og fyrilitaloysi fram um umdømið hjá landi og fólki. Føroyingar verða tí enn einaferð settir í bás sum forstýraðir ørvitisknokkar, hesaferð tíverri eisini í Íslandi, har vit annars altíð hava verið sera høgt í metum og mangan eru borin á lógvum, ikki minst tá arbeiðsneyð hevur verið í Føroyum.

Á kjaktorgum tykist breið semja at vera um, at hetta líkist bara ongum, og summi eru rættiliga óð. Blaðmaðurin, Arni Zachariassen, sum skrivaði Jóhonnu Sigurðardóttir eina almenna umbering í vikuni, hevur á Facebook fingið 2.300 viðurkennandi herðaklapp fyri sína aktión. Men eitt er at harmast á Facebook, við kaffiborðini og á løgtingsvalum fjórða hvørt ár. Spurningurin er, um tigandi meirilutin í Føroyum ikki meira ítøkiliga nú skuldi reist seg og talað at.

Sleppa viðgongdir minnilutar óátalað at seta dagskránna við sínum fordømandi sjónarmiðum, og sleppa teir at oyðileggja umdømi landsins í heimspressuni, og onki verður gjørt, so kunnu summi lættliga fáa ta fatan, at mannafíggindaligur husgunarháttur er góðtikin í Føroyum. Neyvan heldur meirilutin, at hetta er í lagi.

Tí er løtan tann rætta at taka dystin upp um virðisgrundarlagið í Føroyum, nú Stjórnarskipan Føroya kemur til umrøðu. Latið okkum samtykkja skjalið, sum vit til eina og hvørja tíð kunnu siga er okkara veruliga tolsama, rúmliga og víðskygda virðisgrundarlag. Latið okkum verja tey, ið vilja dyrka sína trúgv, og latið okkum verja tey, sum orsakað av trongskygdum prædikantum eru fyri mannminkandi ágangi. Latið okkum samtykkja okkara fólkaræðisliga grundarlag, so vit altíð kunnu siga við umheimin, at soleiðis eru vit veruliga, tí í veruleikanum eru vit menniskjalig og ófordømandi.

Ella eru vit?